Leikrit



# Boðberin

Landsmiðstøðin

# BOðBERIN

**Jólaleikur úr Brasilia**

**Elsbeth Walach**

**Leikurin er bygdur á Jóh. 10:9. Eg eri dyrnar; tann, ið fer inn gjøgnum Meg, verður frelstur, og hann skal ganga inn og ganga út og finna føði.**

| | | |
|---|---|---|
| **Leikarar:** | **Ein boðberi** | **( vanlig klæði )** |
| | **Frú Nøgd** | **( kápu og hatti )** |
| | **Handilsferðandi** | **( kuffert )** |
| | **Vísindamaður** | **( við brillum á nøsini )** |
| | **Sunnudagsskúlalærari** | |
| | **Gomul kona** | **( slitnum klæðum )** |
| | **Tannáringur** | |
| | **Smádrongur** | |
| | **Mamman** | |
| | **Eitt kór** | |

1. partur

**Kórið syngur:**

**Boðberin:** ( glaður við lykt í hándini )Eg skal siga tykkum henda glaða boðskapin: Gud hevur sent okkum son sín.

**Kórið syngur:**

**Boðberin:** ( glaður ) Ja, Gud hevur sent okkum sín son. Vilt tú møta honum?

**Frú Nøgd:** ( kemur inn á pallin við tveimum fullum SMS posum )

**Boðberin:** Eg skal vísa tær vegin.

**Frú Nøgd:** ( steðgar, hyggur niður í posarnar ) Á eg gloymdi at keypa dunnur. Eg má fara niðan aftur í SMS, hvussu kunnu vit annars halda jól?

**Boðberin:** Eg veit á hvønn hátt tú kanst halda jól uttan at vera so full av gremjan.

**Frú Nøgd:** ( hyggur bilsin at boðberanum ) Hvat er tað tú sigur?

**Boðberin:** Far inn ígjøgnum har hurðina. Har inni møtir tú Jesubarninum. Tá verður tað jól. Hann gevur lívinum hjá tær eitt nýtt innihald.

**Frú Nøgd:** ( ill ) Hevur lívið hjá mær einki innihald?

**Boðberin:** Jú, tú hevur nóg mikið av arbeiði og gremjum. Men tí sonnu jólagleðina manglar tær enn.

**Frú Nøgd:** ( avgjørd ) Lurta eftir mær. Lívið hjá mær er fult av gleði, jólagleði og. Eg havi beint nú verið og keypt inn. ( Hon vísir, hvat hon hevur í posunum ) Hygg her: Rís, kirsebersaft, sukur, róma. Eg havi eisini keypt flottar gávur til mannin og børnini hjá mær. Tey fara at verða nakað glað. Í morgin skulu vit í jólveitslu og 2. jóladag skulu vit í eina aðra veitslu. Hetta gevur lívinum hjá mær innihald.

**Boðberin:** Tú dugir væl at planleggja títt lív, og tíðin gongur sera skjótt. Tá tíðin er úti, hvønn týdning hava veitslurnar tá? Hvussu tá við innihaldinum í lívinum?

**Frú Nøgd:** ( Íðin ) Tú spyrt býtt. ( Steðgar á eina løtu og hugsar seg um ) Eg kann viðganga, at eg av og til vitji sjúk og gomul fólk. Heldur tú at Jesus…

**Boðberin:** ….kann geva tær eitt nýtt innihald? Tað kann hann. Kom inn her og síggj!

**Frú Nøgd:** ( Gongur ímóti hurðini, men steðgar bangin ) Á jesusbarnið í eini krubbu, fátækur og lítil! Hvat kann hann geva mær? ( ristir høvdið ) Hetta er ikki tað eg vil hava. Eg má fara at keypa dunnu í kvøld. Tað skal ikki mangla nakað á borðinum i ár heldur. ( Fer út tann vegin hon kom inn ).

**Boðberin:** Har fór hon, full av umsorgan, fyri at tað ikki skuldi mangla nakað á jólum. Tað týdningamesta, venda hon sær frá, og eg kann ikki hjálpa henni.

**Kórið syngur:**

## 2. partur

**Ein handilsferðandi** ( kemur inn við tveimum kuffertum. Hann steðgar á hvílir seg.) Tugnt at bera! ( Turkar sveittan ) Jólini eru ein góð tíð fyri okkum handilsferðandi. Vit vinna nógvar pengar, men tað er ræðiliga strævið. Eg slíti meg.

**Boðberin:** Tú kanst koma inn her at hvíla teg. ( Gongur ímóti hurðini ) Her kanst tú leggja frá tær alt tað tú bert og síðini kanst tú møta Jesusbarninum. Hann vil geva tær frið og gleði.

**Handilsferðandi:** Á, sum mær leingist eftir friði og gleði! ( heldur í kuffertunum og gongur ímóti hurðini ) Men eg má skunda mær. Tú veitst, at tíð er pengar.

**Boðberin:** ( Opnar hurðina ) Kom inn her!

**Handilsferðandi:** Men hurðin er ov trong fyri meg. ( Stríðist fyri at koma inn ígjøgnum hurðina við kuffertunum )

**Boðberin:** Lat kuffertini standa her!

**Handilsferðandi:** Kortanei! Eg ætli mær ongantíð at lata kuffertini standa einsamøll!

**Boðberin:** Lat tey bara standa har! Jesus fer at geva tær nakað, sum hevur nógv meira virði.

**Handilsferðandi:** Nei, nei, tað kann eg ikki. Kuffertini, handilin! ( tekur kuffertini ) Kanska einaferð seinni. Kanska. ( Fer út tann vegin hann kom inn. )

**Boðberin:** ( Ristir høvdið ) Tað kann verða ov seint. Hann vil ikki taka ímóti Guds gávu, sum er friður og gleði. Heldur vil hann stíðast við kuffertini.

**Kórið syngur:**

## 3. partur

**Ein vísindamaður:** ( Kemur inn við einari bók í hondini og við brillum á nøsini. Hann hyggur upp í himmalin og lyftir aðra hondina uppeftir. ) Hesin veldigi himmalin! Á Gud, tú sum hevur skapt alt, hvør stórur og kraftmilkil tú ert. Eingin hevur nakrantíð sæð teg, men eg kenni at tú ert nær.

**Boðberin:** Orsaka! Um eg hoyrdi rætt, so prísaði tú Gudi, Gud hevur ein boðskap til tín.

**Vísindamaðurin:** Argar tú meg?

**Boðberin:** Nei, als ikki. Gud, sum hevur skapað alt, hevur sent okkum sín son. Hann var eitt menniskjað, sum tú og eg. Hetta gjørdi Gud fyri at vísa okkum sín stóra kærleika.

**Vísindamaðurin:** Tvætl. Eg eri ein vitugur maður. Hvussu kann Gud, sum hevur skapt alt universið, senda sonin sín til okkara her á jørð? – Men Gud er í øllum hann hevur skapt. Tí kann eg siga, at Gud er í mínum hjarta. ( Slær seg á bróstið )

**Boðberin:** Um tú vilt, at Gud skal vera hjá tær, mást tú trúgva á sonin hjá honum. Hann kom til okkara sum eitt lítið barn.

**Vísindamaðurin:** Henda teoriin er sera áhugaverd. Bíða eitt sindur. Eg skal royna at finna nakað í bókini hjá mær. ( Hann blaðar og lesur: Prógv, at Gud er til. ) Hvussu kanst tú vita, at Jesus er sonur Guds.

**Boðberin:** Vit kunnu hvørki prógva at Gud er til ella at Jesus er sonur hansara. Tað er Jesus sjálvur, sum sigur frá um, hvussu Gud er og hvussu hann sjálvur er. Far inn gjøgnum dyrnar og hygg sjálvur.

**Vísindamaður:** Eg freistist næstan. ( Gongur ímóti hurðini, men vendir ryggin til ) Nei, eg vil ikki boyggja meg fyri einum barni. Tað eri ov stoltur til.

**Boðberin:** Vísmenninir frá Eysturlondurm komu allan tann langa vegin fyri at tilbiðja barnið, men tú kanst ikki.

**Vísindamaður:** Tað var ein onnur tíð.

**Boðberin:** Men Gud er tann sami í dag. Hann hevur opinberað seg í sínum soni og tú kanst koma at kenna hann, tann einasta sanna Gud.

**Vísindamaðurin:** Eg vil fegin tosa við mínar starvsfelagarar. Um vit fáa tað prógvað vísindaliga, koma vit aftur at hyggja at barninum. ( Fer út )

**Kórið syngur:**

## 4. partur

**Ein sunnudagskúlalærari** ( Kemur inn við onkrum jólapynti og hyggur kring um seg óttafullur) Nú vóni eg at alt fer at ganga væl. Eg vænti, at tað koma nógv fólk til veitsluna í kvøld. Nú má......

***Boðberin***

…eg endurtaka mína vælkomurøðu. *(vendir sær ímóti fjøldini)* Kæru vinir. Tað er mær ein stór gleði at bjóða tykkum í føðingardag hjá okkara HARRA. Barnið í krubbuni…- *(tekur seg til høkuna og hugsar djúpt)* – eg veit ikki hvussu eg skal halda fram *(fer at leita í lummunum eftur einum minnislepa. Finnur hann)*

**Boðberin:** Lat meg hjálpa tær. Far inn gjøgnum dyrnar og møt tað lítla Jesubarnið. Tá fært tú okkurt at siga við tínar áhoyrarar.

**Sunnudagsskúlalærarin:** Túsund takk fyri, men eg havi ikki tíð beint nú. Vit hava veitslur hvørt kvøld í løtuni, í sunnudagsskúnalum, í ungdómsbólkinum, í barnakórinum, og so har sum eg arbeiði skulu vit hava jólaborðhald. Allastaðni noyðist eg at vera har og hjálpa til. Og íkvøld er tað so samkoman sum skal hava jólahald – og eg má trena meg til at halda talu og bjóða vælkomin, og..

**Boðberin:** Tú átti ikki at haft so nógv at gera.

**Sunnudagsskúlalærarin:** Tað er lætt at siga. Men fólk hugsa so lítið um Gud. Tað eru so fá sum trúgva uppá hann. Tí mugu vit trúgvandi vera íðin og siga øllum menniskjum og Jesus so at tey kunnu trúgva uppá hann.

**Boðberin:** Men um Gud nú vil møta tær, nú í hesi jólatíð? Her eru dyrnar inn til Jesubarnið. Hann kann geva tær frið, og hann vil geva tær ta sonnu Jólagleðina.

**Sunnudagsskúlalærarin:** Nei, barnið í krubbuni har inni er bara ein dukka. Tað er jú so langt síðani at Jesus var eitt lítið barn. Hann er ikki á jørðini longur - Hann er í himlinum. Men eg má altso skunda mær – eg má ikki gera naka skeivt framman fyri so nógvum fólki (*hyggur eftir lepanum)*

**Boðberin:** Tú átti ikki at farið uttanum Jesus.

**Sunnudagsskúlalærarin:** *(vendir sær irriteraður)* Lat meg nú vera í frið *(lesur av lepanum)* Barnið í krubbuni…

**Boðberin:** Tú ert eins og øll hini. Tú fert uttanum Jesus. Eisini tey sum halda at tey eru kristin, gloyma Jesus í hesi høgtíð. Hvussu skal tað enda? Hvønn skal eg nú biðja um at koma og síggja? Tað nyttar allar helst onki. Antin eru tey ov full av stúran ella hava tey ikki stundir, ella eru tey ov rík ella ov klók. Eg orki neyvan at vera boðberi longur *(setur lyktina frá sær niður á gólvið, leggur seg á liðuna og sovnar)*

**Kórið**: syngur

**Ein gomul kona**: *(kemur inn)* Á sum eg havi ilt í beinunum. Eg eri so køld, og svong eisini. Og so havi eg ongastaðni at vera. Nú orki eg ikki meira. Eg kann bara seta meg her at bíða eftir deyðanum. *(setur seg eitt sindur burtur frá Boðberanum)*

**Ein unglingi**: *(kemur válandi inn)* Lat meg sleppa forbí teg, títt gamla skrímsl. (*sparkar eftir konuni, og fer víðari)*

**Konan**: Tak tað bert róligt. Tú hevur góða tíð til at náa til tína veitslu.

**Unglingin:** Hvat fyri veitslu? Hygg her! *(tekur ein revolvara úr lummanum)*

**Konan**: Hvat skalt tú við hasum? Tú ætlar væl ikki at...

**Unglingin**: Jú tað ætli eg. Eg ætli at gera av við meg. Lívið hevur onga meining longur.

**Konan**: Tað kann ikki passa. Tú sum ert so ungur og sterkur. Og nú er skjótt jól. Nei, tú mást ikki gera enda á tær.

**Unglingin**: Nei ikki beinan vegin. Eg ætlaði fyrst at gera nakað upp við vinmannin hjá mær. Tað er hann sum hevur skyldina av at eg nú gangi sum eitt ólukkudýr. Hann lokkaði meg at drekka og ballast.

**Konan**. Á, tær nýtist ikki at skylda alt uppá hann. Tú visti hvat tú sjálvur gjørdi, ella?

**Unglingin**: Ja, tað kann gott vera. Men íkvøld skal hann eisini gevast at drekka og ballast, tí íkvøld skal hann doyggja saman við mær.

**Konan**: Men tað er ræðuligt! Og nú er tað eisini jól! – Men hvat kann eg gera?

**Ein lítil drongur**: *(kemur rennandi)* Mamma! Á góðu hjálp mær, eg finni ikki heim. Mamma var so ill og rendi meg út, tí eg var so frekur. Og so fór eg bara í bíðin, og so hugdi eg í vindeygu og so sá eg eitt elektrist tok, og nú veit eg ikki hvat klokkan er, og eg eri so svangur. Eg vil sleppa heim.

**Unglingin**: So tú hevur tvætla teg burtur heimanífrá. Heldur tú eg tími at fylgja tær heim. Eg burdi smurt teg av.

**Konan:** Eg eri ókend her, so eg kann ikki hjálpa tær. Eg eri kedd av tí.

**Lítli:** Hvat skal eg gera nú? *(hyggur seg um)* Men eg sá ei mann við eini lykt. Hann svav, men eg kann bara vekja hann. Kanska fer hann at hjálpa mær. *(fer yvir til boðberan, tekur í armin á honum og ristir hann)* Hey tú!

**Boðberin:** *(reisist skakkur)* Hvat nú? Hvar er mín lykt? Á, har er hon. Gott at hon lýsur enn. *(reisist og hyggur at tí lítla)* Hvat vil tú mær?

**Lítli:** Eg skuldi bara spyrja um tú kundi vísa mær vegin heim.

**Boðberin**: Hetta er eitt undur! Enn er vón. *(hann fer yvir ímóti hurðini og opnar hana)* Ja, kom! Hurðin er opin. Far bara inn!

**Konan**: *(kemur yvir)* Kann eg eisini sleppa inn?

**Unglingin**: Og eg eisini?

**Boðberin**: Sjálvandi. Øll somul. Gud býður tey sum hava tað ringt og hava tungt at bera, so tey kunnu koma at møta hansara soni. Hann kann hjálpa

øllum. Komi og síggi! Nú koma tit verðuliga heim.

**Konan:** *(hyggur eftir sínum klæðum)* Men eg eri so ófantaliga kløðd!

**Boðberin:** Kom bara sum tú ert.

**Unglingin:** Men eg havi gjørt so nógv skeivt!

**Boðberin:** Tú kanst siga alt hatta við Jesus. Hann kann fyrigeva tær og geva tær eitt nýtt lív. Kom!
*(Lítli, konan og unglingin fara inn. Boðberin stendur í hurðini)*

**Boðberin**: *(lítil pausa)* Hvussu kundi eg sovna og gloyma mína uppgávu? Nú síggi eg at mær tørvar eisini at síggja Jesubarnið. Kannska tørvar mær tað meiri enn hini. *(fer innar)*
**Kórið**: *(saman við teimum ið fóru innar)* Eg gleði meg hvørt Jólakvøld ... *(1. ørindi. Boðberin hyggur at dyrnum og syngur 3. ørindi)*

Ímeðan:

**Mamman:** *(kemur frá sær sjálvum inn á senuna)* Hvar er sonur mín. Eg finni hann ongastaðni. Okkurt er hent honum. *(fer ímóti dyrnum)* Hvat er hetta fyri hurð? Eg hoyri sang. Kanska eri eg á rættari leið? Eg vil fara innar at hyggja. *(fer inn)*

**Unglingin:** *(kemur út gjøgnum dyrnar)* Hetta var eitt vælsignað kvøld. Eg havi møtt Jesusi. Gud hevur fyrigivið mær og givið mær eitt nýtt lív. Hetta má eg siga fyri mínum vini. Vit mugu eisini fyrigeva hvørjum øðrum. Og so vóni eg at hann eisini kemur og møtir Jesubarninum. *(fer út til síðuna)*

**Mamman**: *(kemur út saman við tí lítla)* Á, eg eri so glað fyri at eg fann hasa hurðina. Her kundi eg leggja alt sum eg strevaðist við. Eg vóni at eg ongantíð fari at gloyma hesa gleðina eg havi fingið her. Kom, vit mugu fortelja tað fyri teimum har heima.

**Lítli:** *(hyggur eftir tí gomlu konuni)* Mamma, handan gamla konan hevur onga familju. Kann hon ikki komaheim við okkum.

**Mamman:** Sjálvandi; tað er gott at tú hugsaði um hana. *(sigur við konuma)* Hevur tú ikki hug at koma heim til okkara? Kom, so kans tú hvíla teg, og tú skalt fáa so nógv at eta sum tú vilt.

**Konan**: Á, tit eru so fitt og góð við meg!

*(øll fara út, smílandi og eru glað, bara Boðberin er eftir)*

**Boðberin**: *(lyftur lampuna høgt upp)* Eg eri so glaður fyri at eg til endans fekk sagt tann glaða boðskapin um at Gud sendi okkum sín son. Eg vil lyfta ljósið enn hægri *(lyftur tað enn hægri)* fyri at tey sum enn ganga í myrkri, kunnu síggja hesa hurðina og kunnu koma inn og møta Frelsaranum. Soleiðis eigur man at halda jól.

**Kórið**: *(øll hini koma innaftur og syngja við)*